**Farsóttarmálsøkið yvirtikið á 1'ára degnum hjá Fólkaheilsustýrinum**

Eg eri sera fegin um, at vera boðin her í dag, at siga nøkur orð. Takk fyri tað.

Nú er eitt ár liðið síðan Fólkaheilsustýrið varð sett á stovn, tann 1. januar í 2023. Fólkaheilsustýrið – okkara nýggi heilsumyndugleiki, sum hevur til endamáls at veita heilsufakliga ráðgeving og vegleiðing.

Í fyrstu syftu hevur talan, í høvuðsheitum, verið um at savna virksemið, sum áður var í Fólkaheilsuráðnum, Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu og Ílegusavninum í Fólkaheilsustýrið.

Í hesum tíðarskeiðinum eru tit í Fólkaheilsustýrinum farin undir tilgongdina at menna og skipa stovnin við viðkomandi førleikum og undirstøðukervi, sum skal tryggja stovninum hollan kunnleika til føroysk heilsuviðurskifti og samfelagsviðurskifti sum heild.

Harumframt hevur eisini verið arbeitt við at fyrireika yvirtøkuna av farsóttarmálsøkinum, sum formliga varð yvirtikið frá donskum myndugleikum fyri tveimum døgum síðani – 1. januar 2024.

Tað tekur tíð at byggja ein stovn upp. Sambært ætlanini fyri Fólkaheilsustýrið frá 2021, er alt arbeiðið at savna gamlar og nýggjar uppgávur undir nýggja Fólkaheilsustýrinum býtt í fýra stig, sum tilsamans væntast at taka seks ár at fremja.

At styrkja Fólkaheilsustýrið, er ein av raðfestingunum hjá mær í 2024. Endamálið við raðfestingini, er at fremja fyribyrging og fólkaheilsu og at tryggja yvirtøkuna av farsóttarmálsøkinum.

**Farsóttarmálsøkið**

Tað er at gleðast um, at farsóttarmálsøkið formliga er yvirtikið, og at Fólkaheilsustýrið hevur fingið ábyrgdina av at umsita økið.

Játtan er sett av til at styrkja Fólkaheilsustýrið til næsta stig, sum er at tryggja íverksetanina av farsóttarmálsøkinum, soleiðis at økið kann virka til fulnar á føroyskum hondum.

Sum partur av fyrireikingunum til yvirtøkuna, hevur verið arbeitt við at gera eina samstarvsavtalu millum føroyskar og danskar myndugleikar á farsóttarmálsøkinum. Avtalan er gjørd, og varð undirskrivað beint undan jólum 2023.

Fólkaheilsustýrið arbeiðir við eini nýggjari farsóttartilbúgving, sum skal vera klár at seta í verk, tá ið tørvur verður á tí.

Í kreppustøðum hevur tað fyrimunir fyri tilbúgvingina og handfaringina av slíkum støðum, at avgerðarrætturin er á føroyskum hondum.

Nýggj farsóttarnevnd er eisini sett í sambandi við yvirtøkuna av farsóttarmálsøkinum. Fyrsti fundurin hjá nevndini var tann 20. desember 2023, har nevndin skipaði seg við Michael Boolsen, fúta, sum formanni. Tá fekk eg eisini høvi at heilsa uppá nevndina.

**Fyribyrging**

Fyribyrging er eitt av hjartamálunum hjá mær. Í ár er ætlanin, at Heilsumálaráðið saman við Fólkaheilsustýrinum og øðrum viðkomandi pørtum, fara undir at gera eina nýggja fólkaheilsuætlan fyri Føroyar.

Eina fólkaheilsuætlan, sum miðar eftir at styrkja almennu heilsustøðuna hjá føroyingum, sum eggjar til heilsugóða lívsførslu, sum mennir heilsufremjandi viðurskifti og fyribyrgir sjúkuelvandi og heilsuskaðiligviðurskifti, í samfelangum sum heild.

Eitt vælvirkandi fólkaheilsuarbeiði fevnir bæði um heilsufremjandi og sjúkufyribyrgjandi tiltøk.

Fólkaheilsustýrið luttekur eisini í arbeiðinum at dagføra roykilógina. Arbeiðið byrjaði í 2023 og heldur fram í ár. Arbeiðið verður skipað í fleiri pørtum; millum annað at orða lógaruppskot, at gera tilmælir um fyribyrgjandi tiltøk og tilmælir um roykifrávenjing – ella tilmælir um at leggja av.

Endamálið við arbeiðinum at dagføra roykilógina er at tryggja øllum rættin at liva og virka í einum roykfríum umhvørvi. At dentur verður lagdur á at fyribyrgja, at børn og ung byrja at roykja ella brúka aðrar nikotin- og tubbaksvørur. Og at tey, sum ynskja at leggja av at roykja ella snúsa, skulu hava tilboð um frávenjing.

Úrslitini av fyribyrgingarátøkum síggjast ikki beinanvegin, men er ein íløga í framtíðina. Ein neyðug íløga, sum skal verða við til at fremja fólkaheilsu og framtíðartryggja heilsuøkið. Tí er neyðugt at halda fast í ætlanini um at menna Fólkaheilsustýrið, sum er okkara myndugleiki á økinum.

At vælferðartænastur skulu tryggjast, er millum høvuðsmálini hjá samgonguni. Vit hava eitt gott og framkomið heilsuverk, sum veitir vælferðartænastur til borgarar í Føroyum. Vælferðartænastur, sum eru grundleggjandi fyri trivnað og menning í samfelagnum.

Heilsuøkið er í støðugari menning, og tað er týdningarmikið, at heilsutænastur og heilsuskipanir eru tíðarhóskandi og framhaldandi verða mentar og dagførdar. Í sambandi við menning innan heilsuøkið, er tað leikluturin hjá Fólkaheilsustýrinum at ráðgeva og vegleiða politiska myndugleikanum.

Eg vil enda við at ynskja Fólkaheilsustýrinum hjartaliga tillukku við fyrsta árinum, og blíðan byr frameftir.

Síðani vil eg eisini gjarna ynskja tykkum øllum eitt gott nýggjár.

Takk fyri.